gult10 cyan10 magenta10 svart10

FISKIVINNUTÍÐINDI

Gongur trekt við svartkjaftasamráðingunum

SVARTKJAFTUR
Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Allan mikudagin og hósdagin sótu embætismenn frá teimum londunum, sum veiða svartkjaft á fundi fyri at finna ein nýggjan býtislykli, sum skal steðga ótálmaðu veiðuni eftir svartkjafti.

Talan eru um Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg, Russland og ES londini. Talan er um eina stóra samráðingarnenvd. Heili 35 verilsir eru bíløgd á Hotel Føroyum, har fundurin verður hildin

Tað var lítið at frætta frá fundinum á middegi í gjar áðrenn blaðið fór til prentingar, men Sosialurin skilir, at samráðingarnar eru trekar og partarnir standa enn langt frá hvørjum øðrum.


Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri

Otto Gregussen, norskur fiskimálaráðharri

Heldur ikki fiskimálaráðharrin Jøgern Niclasen visti nakað, men hann sigur, at kemur onki burturúr á hesum fundinum, so kann henda, at kallað verður saman til nýggjan fund, har politikkararnir koma saman.

Av tí at ongin semja er enn funnin um, hvussu svartkjafturin skal býtast millum londini, er veiðan endað upp á 1.4 milliónir tons fyri í fjør Hetta er tvífalt so nógv sum stovnurin tolir.

Føroyska samráðingarnevndin telir sjey fólk og leiðari er Andrass Kristiansen, fiskifrøðingur, sum starvast í Fiskimálastýrinum.

Tvídrátturin er serliga millum ES og Noregi. ES slett ikki ganga við til, at Noreg fær so stóran part av samlaðu kvotuni, sum norðmenn ynskja. Norðmenn eru av eini heilt aðrari støðu.

ES órímuligt

Norski fiskimálaráðharrin, Otto Gregussen, segði, tá hann var í Føroyum herfyri, at norðmenn áttu søguligan rætt til svartkjaftin.

– Eg haldi at uppskotið hjá ES til ein býtislykil, har Noreg bert fær 12 prosent av kvotuni er heilt órímiligur. Vit hava verið við til at fiska svartkjaftin frá byrjan og vit kunnu slett ikki góðtaka uppskotið frá ES, sigur Otto Gregussen.

– Eg skilji heldur ikki tilmælini frá ICES um svartkjaftastovnin sum eina null loysn. ICES sigur greitt at bann eigur at vera sett fyri allari svartkjafta veiðu til ein semja er fingin millum londini um býtislykilin, og tað merkir ikki tað sama sum at øll svartkjaftaveiða steðgar í komandi ári, sigur Otto Gregussen.

Allir mugu slaka

Føroyski fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen íð hevur verið stigtakari til svartkjaftafundin, segði herfyri.

– Skulu londini hava tað tey ynskja, so gevur hetta í vanligari prosentrokning langt omanfyri 100 prosent. Allir mugu slaka, tí vit mugu niður á 100 prosent.

Føroyska kravið til svartkjaftakvotu er rættuliga stórt. Skuldi samlaða kvotan komið niður á 700.000 tons, so er føroyska kravið eitt sindur omanfyri 200.000 tons av hesum.

ICES hevur mælt til, at bann verður sett fyri at veiða svartkjaft, til ein semja um býti er fingin í lag millum londini.

Fiskifrøðingar kunnu geva føroyingum størri kvotu

KONGAFISKUR
Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Fiskifrøðingar úr Føroyum, Íslandi og Noregi arbeiða við eini verkætlan, har teir royna at prógva upprunan til kongafiskin í Irmingarhavinum.

Talan er um tvey sløg av kongafiski. Annað slagið livir longur uppi í sjónum, og er minni kongafiskur. Hesin er helst tann sami, sum livir í grønlendskum sjógvi. Men fiskurin, sum livir á djúpari vatni verður hildin at vera sami stovnur, sum er í føroyskum og íslendskum sjógvi, men tað er ikki prógvað enn.

– Eitt er so staðfest, kongafiskaveiðan undir Føroyum minkaði úr 15.000 tonsum og niður í 7000 tons so skjótt, sum av álvara varð farið at fiska kongafisk í Irmingarhavinum. Tað kundi so bent á, at talan var um sama stovn, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

Ljósafelli, ein av kongafiskatrolarunum

– Verður tað staðfest, at djúpvatnskongafiskurin í Irmingarhavinum er av sama stovni sum okkara, so er støðan ein heilt onnur hjá føroyingum, enn hon er í dag. So eru vit knappliga eitt strandaland og tá er tað knappliga ein partur av okkara kongafiski, sum verður fiskaður í Irmingarhavinum. Og hetta skal merkja, at vit fáa eina munandi størri kvotu enn vit eiga í dag, sigur Jørgen Niclasen.

Kongafiskurin í Irmingarhavinum varð kvoteraður fyri einum fimm árum síðan. Føroyingar eiga kvotu saman við Grønlandi. Hendan kvotan er 20.000 tons og av henni eiga føroyingar í ár 3300 tons.



Oljuskattadeildin helst í Klaksvík

OLJUPENGAR
Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri boðaði herfyri frá tí tinginum, at tann parturin av Toll og Skatt, sum skal taka sær av skatting av eini komandi oljuvinnu, kemur ikki at liggja í Havn.

Síðan hava seiglívaði tíðindi gingið um, hendan deildin fer at liggja í Klaksvík og at bróðurparturin av peninginum sum fer at streyma til landið, verður olja funnin, skal inn um Klakk at venda, áðrenn hon fer út aftur í samfelagið.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri vil hvørki vátta ella avsannað tíðindini.

– Tað einasta eg vil siga er, at enn er ikki tikin endalig avgerð um hetta, men at hendan avgerð verður tikin skjótt, sigur Karstin Hansen.

Tríggjar grindir í eina viku

Í allari tokuni í gjárkvøldið lógu bátar hjá eini grind, sum var funnin í Nólsoyarfiði. Tað var kjaftsvart í mjørka í løtum og kortini eydnaðist at halda grindini til stutt fyri midnáttarleitið. Grindin taldi 57 hval og varð býtt millum tey, ið vóru í drápinum.

Hetta er triðja grindin innan stutta tíð í Føroyum. Fyrsta varð hildin til í Vestmanna, síðan var ein hildin til á Sandi og nú í Havn.

je

gult11 cyan11 magenta11 svart11

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 6. juli til hósdagin 12. juni

Oyggjaleikirnir á Man

Sjónvarpið fer at senda frá Oyggjaleikunum hvørt kvøld. Fyrsta sendingin kemur leygarkvøldið kl. 22.40. Øll hini kvøldini koma tær kl. 21.00.

9. oyggjaleikirnir verða 7. juli 2001 settir á Man, sum eisini var vertur fyri fyrstu oyggjaleikunum í 1985. Man er í stødd á leið við Streymoynna, og har búgva 64.000 fólk. Høvuðsstaðurin á oynni eitur Douglas, og har fara flestu ítróttagreinirnar fram.

Á leikunum verður kappast í 15 ítróttagreinum, harav føroyingar luttaka í teimum 10.

109 ítróttarfólk og 41 leiðarar verða við í hópinum. Saman við øðrum hjálparfólki, pressuni, foreldrum og ferðafólki annars telur føroyska ferðalagið til Man 260 fólk.

Oyggjaleikanevndin hevur leigað flogfar hjá Atlantic Airways at flyta hesar mongu føroyingarnar til og frá oynni, og hetta flogfar fer at flúgva tríggjar túrar hvønn veg.

Tær 10 ítróttagreinirnar, sum føroyingar fara at luttaka í, eru hesar:

Fimleikur	kvinnur og menn
Svimjing	kvinnur og menn
Fótbóltur	bert kvinnur
Badminton	kvinnur og menn
Flogbóltur	kvinnur og menn
Borðtennis	kvinnur og menn
Bogaskjóting	kvinnur og menn
Triatlon	kvinnur og menn
Frælsur ítróttur	kvinnur og menn
Súkkling	bert menn

Hetta er fyrstu ferð føroyingar royna seg í kvinnufótbólti á oyggjaleikunum. Føroyingar luttóku í 1989 og 1991 við manslandsliðnum í fótbólti, men hesi seinastu 10 árini hevur fótbólturin ikki verið í føroyska ferðalagnum.

Triatlon er nýggj ítróttagrein í Føroyum, eins og ítróttagreinin eisini ernýggj í Oyggjaleikunum. Føroyingar luttaka fyri fyrstu ferð í triatlon kapping uttanlands, og tað verða 1 kvinna og 4 menn, ið manna føroyska triatlonliðið.

Fyrstu ferð oyggjaleikirnir vórðu hildnir á Man høvdu føroyingar av sínum eintingum eitt fimleikalið við, sum hevði framsýning undir setanarhátíðini. Síðani hevur tað eydnast at fáa fimleik við sum ítróttagrein í leikunum, og hetta er 6. ferð vit luttaka í fimleiki. Á leikunum á Gotlandi fyri tveimum árum síðani var fimleikur ikki við, men nú hevur tað eydnast aftur at fáa fimleikin við á skránna.

Leikirnir verða sum sagt settir leygarkvøldið 7. juli og dagin eftir byrja kappingarnar. Kappingarnar halda fram til fríggjadagin 13. juli, tá endahátíðin verður.

Fríggjakvøldið og leygardagin kemur føroyska ferðalagið heimaftur.

svf Leygarkvøldið kl. 22.40

Leygardagin kl. 17.00

Sjómansendingin Vitin

Hallgrím Miðberg, sum skrivaði sangin "Eg siti so eina", er gestur í útvarpstovuni. Hesin fryntligi bakarameistarin og kokkurin, sum av og á fer til skips, hevur sjálvandi tikið guitaran við í dag.

Endursent verður sunnudag kl. 15 og hósdag kl. 13.3o.

M.C. Restorff leggur til rættis

ÚF Mánadagur kl. 17.05

Hvat nú?

Norska dansiorkestrið Ole Ivars verður í sendingini "Hvat Nú"

Prátað verður við William Kristoffersen, ið spælir bass og syngur. William Kristoffersen er tann norðmaðurin, sum hevur skrivað flest dansitekstir og løg.

Elis Poulsen leggur til rættis.

Fríggjadagur 6. juli

svf

18.30 Likkulikkuleia 6
19.00 Trý á ferð 4:13
19.25 Anita Christensen 2:2 – fotomodell og nevaleikari
20.00 Dagur og Vika
20.20 Sjónvarpið hjá Finn
20.45 Gekkur
21.25 Týsdagur við Morrie – amerikanskur autentiskur filmur
22.50 Atlantic City – amerikanskur/-franskur filmur Óhóskandi fyri børn
00.30 Liðugt

EUROSPORT.com

07:30 Football
09:00 Car Racing
09:30 Super Racing Weekend(Tm)
10:00 Golf
11:00 Football
12:30 Motorcycling (Live)
13:00 Motorcycling (Live)
14:00 Motorcycling (Live)
15:15 Motorcycling (Live)
16:30 Football (Live)
18:15 News
18:30 Football (Live)
20:30 Boxing
22:00 News
22:15 Xtreme Sports
22:45 Xtreme Sports
23:15 Motorcycling
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

00.00 TLZ: »Great Writers of the 20th Century«
01.00 TLZ: »The Human Animal«
02.00 TLZ: »Background Brief«
02.15 TLZ: »What have the 70's ever done for us?«
02.25 TLZ: »Science Bites – Invisible Worlds«
02.30 TLZ: »The Ageing Files«
03.00 TLZ: »Design for An Alien World«
03.30 TLZ: »It's only Plastic«
03.55 TLZ: »Under the Lens - Tree«
04.00 TLZ: »Back to the Floor…again – Man on the Move«
04.40 TLZ: »Megamaths – Tables – Four Times Table«
05.00 TLZ: »Discovering Portuguese«
05.30 TLZ: »Essential Guide to Britain«
06.00 Superted
06.10 Monty the Dog: »Monty at the Vets«
06.15 Playdays
06.35 Run the Risk
07.00 Hero to Zero
07.30 Celebrity Ready Steady Cook
08.00 Style Challenge: »Bride and Groom's Mothers«
08.25 Real Rooms: »Sutton Coldfield/-Cotteridge«
08.50 Bargain Hunt
09.20 Antiques Roadshow: »Eston, Middlesborough«
10.05 Wildlife: »Hippos Out of Water«
10.35 TLZ: »White Heat – Step Right up«
11.25 Changing Rooms: »Cardington«
11.55 Celebrity Ready Steady Cook: »Wendy Richard & Todd Carty«
12.25 Style Challenge: »Chocoholics«
13.00 Doctors
13.30 Eastenders
14.00 Real Rooms: »Cottage, Kenilworth«
14.30 Bargain Hunt
15.00 Superted
15.10 Monty the Dog: »Monty at the Vets
15.15 Playdays
15.35 Run the Risk
16.00 Hero to Zero
16.30 Top of the Tops 2: »Shania Twain Special«
17.00 Gardeners' World
18.00 Eastenders
18.30 Passport to the Sun
19.00 Hi De Hi
20.00 Mrs Bradley Mysteries
21.00 Coogan's Run: »Get Calf«
21.30 Later with Jools Holland
22.30 The Stand up Show
23.00 The Royle Family
23.30 Game On – Tangerine Candyfloss and Herne Bay Rock«

BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Talking Movies (r)
02:00 BBC News
02:30 USA Direct (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk (r)
05:00 BBC News
05:30 Click Online
06:00 BBC News
06:30 USA Direct (r)
07:00 BBC News
07:30 HARDtalk
08:00 BBC News
08:30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines (r)
09:00 BBC News
09:30 Life (r)
10:00 BBC News
10:30 HARDtalk (r)
11:00 BBC News
11:30 Talking Movies (r)
12:00 BBC News
12:30 Life (r)
13:00 BBC News
13:30 HARDtalk (r)
14:00 BBC News
14:15 World Business Report
14:30 Talking Movies (r)
15:00 BBC News
15:30 Life (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Future Fantastic
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Correspondent
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

3 á rin

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen (1000)
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Melrose Place - classic
13:45 Interne Affærer
14:45 Pæn pige - sej sild
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch
16:35 Ricki Lake
17:30 Sabrina - skolens heks
18:00 Susan - sød og single
18:30 Bette
19:00 Sjov og Spas
19:30 Sjov og Spas
20:00 Faktor 21 Film: Manhattan Murder Mystery
22:00 Sex & the City
22:30 Stormfloden
00:50 Lægerne
01:50 Duel i New York
03:30 Sunset Beach
04:20 Sunset Beach (81) (G)

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Hilmar Bech í Porkeri lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Bjarni Mohr leggur til rættis
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Feðgar á ferð (e) Marius Johannesen lesur 3. part av framhaldssøgu eftir Heðin Brú.
09.33 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Hilmar Bech í Porkeri lesur
10.05 Fimleikaløtan - vika 3 Beinta Denielsen og Elsa Maria Bærentsen skipa fyri.
10.10 Máltráðurin Øssur Egholm leggur til rættis
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) Gunnvør Poulsen stilar fyri
11.33 Undir dagurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.20 Tíðindini
12.40 Dagurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Í vingarðinum (e) Alexander Samuelsen leggur til rættis.
15.00 Tíðindi
15.03 Rót og rútma (e) Petur Rouch velur country tónleik
16.00 Tíðindi
16.03 Zenith Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu skipa fyri.
17.00 Tíðindi
17.05 Vikuskiftið Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu leggja til rættis.
18.00 Friggjakvøldstónar Øssur Egholm leggur til rættis.
18.25 Skrá og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Tónleikur
19.00 Oyggjaleikir á Man Hilmar Jan Hansen, Suni Merkistein og Dia Midjord leggja til rættis.
20.00 Estudio 2000 Kári Annand Berg spælir tónleik.
21.00 Fimleikaløtan - vika 3 (e) Beinta Denielsen og Elsa Maria Bærentsen skipa fyri.
21.05 Dagsetur Ginna Midjord stilar fyri
22.00 Tíðindi

Rás

09:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Góðanmorgun-tónleikur
11:00 Gesturin (e) Vitjan á Rás 2
12:00 Tíðindi & lýsingar
12:15 Tónleikur
13:00 Leysløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi & lýsingar
15:15 Ynskløtan (framhald)
16:00 Breytin Beinleiðis ferðslusending
17:00 Lættur tónleikur
18:00 Tíðindi & lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
21:00 Tíðindi & lýsingar
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Beatin v/ Eyðfinn Drewsen Tónleikasending fyri ung
22:30 Náttartónleikur

Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Brot og bitar (e)
14.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bibliuna (e) Vertur er Simun Absalonsen, gestur er Jógvan Zachariassen.(e)
15.00 Tíð til Gud (e)
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379 Vit spæla lovsong tann næsta tíman.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan. Biði verður fyri bønarevnunum Tónleikur
19.00 Tónleikur
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
21.00 "Tíð til Gud": Vertur tykkara er Jógvan Skýlindal. Í hesi sending verður tydningurin av Nehemiasar bók fyri tann trúgvandi í okkaru tíð viðgjørdur.
22.00 Horizon Star við Stellu Zachariassen (e)
23.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.05 Góður tónleikur fyri ung
01.00 Blandaður tónleikur, dagsins orð, okkara dagliga breyð o.a.
04.00 Vit gevast